

## Bogaskjútti setti venjingarmet í Póllandi

Føroyskir bogaskjúttar eru í løtuni í Rzesow í Póllandi, har tveir luttakara eru við. Talan er um 16 ára gamla Magnus Andreassen og 20 ára gomlu Anniku Vang. Mánadagin var fyrsti venjingardagurin til kappingina, sum byrjar hósdagin. Mánadagin gjørdi Magnus Andreassen bart, og skeyt tað besta hann nakrantíð hevur skotið til venjing. Heili 582 stig av 600 møguligum. Í gjár gekk vanliga væl til venjingarnar. Men ein trupulleiki vísir seg at vera, at venjingarhølini eru sera smá, og tí er sera trongt. Annars ganga fyrireikingarnar til kappingina rímiliga væl, hóast alt ikki er klárt til at byrja í morgin. Hetta skrivar heimasíðan http://www.archery-fo.net/ millum annað.

# Komnir langt við bjargingarætlan

**– Tað er altíð ein møguleiki, at vit fara á heysin, men vit trúgva uppá tað og eru komnir rættiliga langt við bjargingarætlanini, sum longu kann koma í ovurmorgin, greiðir Todi Jónsson, stjóri í FC Amager, frá, sum tó ikki noktar fyri, at felagið enntá roynir stuðlskonsert og stuðulsdyst fyri at fáa endarnar at røkka**

KREPPA

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Danskir miðlar hava í longri tíð gjørt nógv burturúr FC Amager, sum byrjaði sum ein øgiliga bjartskygt ætlan, sum nú er í sera tungum sjógvi.

Tó vil Todi Jónsson ikki siga, at felagið er um at fara á heysin.

– Vit arbeiða við eini heildarætlan. Vit royna millum annað at fáa spælararnar ein fimting niður í løn, men tað vilja teir sjálvandi ikki ganga við til, fyrr enn heildarætlanin er klár, staðfestir Todi Jónsson. Hann leggur tó afturat, at tað als ikki er nakað loyndarmál, at FC Amager hevur stórar fíggjarligar avbjóðingar.



*Hóast FC Amager hevur stórar fíggjarligar trupulleikar, sum mestsum steðgar tilgongdini til SAS liguna, so er Todi Jónsson bjartskygdur viðvíkjandi bjargingarætlanini hjá felagnum*

### Útseta dreymin

Todi Jónsson er tó avkláraður við, at felagið ongan møguleika at klára seg so væl, sum ætlanin var.

– Vit hava á ongan hátt slept dreyminum hjá okkum. Men vit hava útsett hann. Tá vit byrjaðu var stórt bjartskygni, og hetta bar okkum langt. Fíggjarkreppuna kundu vit ikki spáa um, men nú felagið klárar ikki ætlanirnar nú, tí tað klára íleggjararnir hjá okkum heldur ikki. Hetta merkir, at vit mugu revidera málsetningin, og beint nú arbeiða vit við eini ætlan, ið skal halda okkum í gongd til 1. juli, sigur Todi Jónsson.

Todi Jónsson hevur leingi sagt, at FC Amager arbeiðir við fíggjarligum loysnum. Men nýstani nú greiðir hann frá, hvat tær ítøkiliga eru.

– Eg kann ikki siga ov nógv um tað, men tað gongur fyrst og fremst út uppá, at fáa íleggjararnar at seta meiri pening í fyritøkuna, staðfestir Todi Jónsson.

### Dysturin ikki til lønir

Í seinastu viku spældi FC Amager ein venjingardyst ímóti FC Nordsjælland, sum teir kallaðu ein stuðulsdyst. Um stutta tíð verður eisini ein stuðulskonsert. Hetta hava danskir miðlar tikið upp, sum um at tað var fyri at kunna gjalda lønir, men hetta avsannar Todi Jónsson.

– Vit kallaðu tað stuðulsdyst, fyri at tey, ið hava kenslur fyri felagnum kundi fáa ein møguleika at stuðla rakstrinum hjá okkum, men mann fær ikki nógvan pening fyri ein tílíkan dyst, og tað er skeivt at siga, at tað er til lønir, sigur Todi Jónsson. Hann noktar tó á ongan hátt fyri, at ein stórur partur av rakstrarútreiðslunum fer til lønir.

### Bara fíggjarligar trupulleikar

Hóast FC Amager sær út til at vera illa fyri fíggjarliga, so er Todi Jónsson ikki bangin um ítróttarliga partin.

– Vit klára ikki at tiltrekkja teir bestu leikararnar, men potentiali og tað ítróttarliga eru framvegis góð, sigur Todi Jónsson, sum staðfestir, at málsetningurin í felagnum er broyttur. Nú er málið fyrst og fremst at brúka minni pening enn teir hava.

### Pressan fylgir teimum spennandi

Hóast fjølmiðlarnir hava fylgt FC Amager øgiliga tætt í seinastuni, so heldur Todi Jónsson ikki, at teir eru verri fyri, enn nakað annað felag.

– Tað sigur seg sjálvt, at pressan vil fylgja okkum, tí vit eru ambitiøsir. Tá tað nú ikki gongur so væl hjá okkum, so fylgir pressan okkum sjálvandi eisini. Kolding lækkaði longu í desembur lønirnar hjá teimum, men tað leggur pressan minni í, sigur Todi Jónsson.

### Eik og sponsoravtalan

Hvørja ferð FC Amager spælir dyst, so stendur Eik á blusunum hjá felagnum. Nú bæði Eik og FC Amager síggja út til at klára seg minni væl, so ætlar Eik á ongan hátt at sleppa avtaluni.

– Vit fóru í gongd við eina sponsoravtalu fyri trý ár í summar, og henni ætla vit als ikki at sleppa, og tað hevur ikki ein gong verið upp á tal, staðfestir Bjarni Olsen, stjóri í Eik. Hann leggur tó afturat, at Eik ikki hevur nakrar ætlanir um at seta pening í FC Amager.

## Mollerup er ikki FC Amager



**Í gjár takkaði Brian Mollerup fyri seg, sum nevndarformaður í FC Amager. Hetta er Todi Jónsson avkláraður við. – Brian Mollerup er ikki FC Amager. Tað var eg sum byrjaði FC Amager, staðfestir Todi Jónsson**

FÓTBÓLTSFELAG

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Brian Mollerup, sum er kendur frá sínum arbeiði í millum øðrum Slagelse FH, har hann var við at gera felagið, tað sterkasta í Evropa, er ikki longur partur av FC Amager. Hesum er Todi Jónsson tó ikki bangin fyri.

– Tá vit byrjaðu stóðu fólk í kø at sleppa við. Soleiðis er ikki beint nú, og Brian Mollerup er farin burturúr, tí tað ikki gongur so væl, sum vit vónaðu, men Brian Mollerup er ikki FC Amager, sigur Todi Jónsson.

### Multiarena

12. mars verður avgjørt, um Copenhagen Multiarena verður veruleiki. Brian Mollerup er framvegis í Copenhagen Multiarena, og Todi Jónsson staðfestir, at verður arenaðin til nakað, so verður FC Amager við.

Hinvegin staðfestir Todi Jónsson, at felagið ikki blívur burtur, um ongin multiarena verður.

– FC Amager verður framvegis til, um ongin multiarena verður. Vit hava eitt gott grundarlag, og tað eru nógvir vallir á Amager, har vit kunnu spæla dystir, staðfestir Todi Jónsson.

# Føroyingarnir í FC Amager sleppa framat

**Nú tað ikki gongur eftir vild fíggjarliga í FC Amager, og felagið ikki hevur ráð til leikarar, ið kundu lyft felagið, so sær Todi Jónsson, stjóri, okkurt positivt hóast alt, tí nú sleppa føroysku leikararnir at spæla**

FÓTBÓLTUR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

FC Amager hevur fíggjarligar trupulleikar, men tað er framvegis eitt, ið Todi Jónsson er fegin um.

– Tað positiva við føroyskum eygum er, at nú sleppa føroysku leikararnir í felagnum framat. Erling Jacobsen og Páll Klettskarð spæla fast inni og Hans Jørgensen er eykamálmaður, greiðir Todi Jónsson frá.

Spurdur um hetta ikki bara er tí, at felagið ikki megnar at fáa betri leikarar, so er Todi Jónsson ikki mjúkur.

– Sigur tú, at leikararnir eru vánaligir. Hesir eru av betri kvaliteti enn føroyska landsliðið, og tað skalt tú ikki blanda uppi. Hetta eru leikarar, vit veruliga trúgva upp á, og tað er gott, at teir fáa møguleikan í felagnum, tí hetta kann hækka støðið á landsliðnum, sigur Todi Jónsson. Samstundis vísir hann á, at føroyska landsliðið kann gerast betri við hesum leikarunum.